Starvslýsing

Stuðulstænastan

## Stuðulsfólk til Stuðulstoymið í Norðoyggjum

Vegna barnsburðarfarloyvi verður søkt eftir stuðulsfólki til Stuðulstoymið í Norðoyggjum 26 tímar um vikuna frá 1. oktobur 2008 fyribils til 1. apríl 2009 við møguligari leingjan.

Stuðulstænastan hevur til endamáls at veita sosialpedagogiska hjálp, fylgi, eftiransan og umsorgan til brúkarar um alt landið.

Málbólkurin hjá toyminum er heimabúgvandi fólk omanfyri 18 ár, ið hava ein skerdan sálarligan og likamligan virkisførleika.

**Arbeiðið hjá toyminum fevnir um:**
- At stimbra og menna praktiskar og sosialar førleikar hjá brúkaranum.
- At bøta um møguleikan hjá brúkaranum at fáa eitt trygdarnet.
- At stimbra ígongdsetan av virksemi, ið brúkarin ynskir ella hevur tørv á.
- At geva ráð og vegleiðing í vanligum dagligum virki, so sum matgerð, reingerð, klædnavask, handilsørindum, peningaviðurskiftum og øðrum, við atliti til, hvat tann einstaki brúkarin megnar.
- At vegleiða og samskipa samstarv við t.d. Almannastovuna, Økispsykiatriina, Psykiatriska Depilin og aðrar myndugleikar.
- At skipa so fyri, at brúkarin fær møguleika at leggja gerandislív sítt soleiðis til rættis, at tað verður í samsvar við egnan tørv og normar.

**Førleikakrøv**
Vit vænta, at tú:
- Kann arbeiða sjálvstøðugt og einsamallur í heimi brúkarans og samstundis kann átaka tær at arbeiða í einum øki, har tað ræður um intuitión.
- Vísir áhuga og virðing fyri brúkaranum og samstundis arbeiðir professionelt.
- Ert stuðlandi og hjálpir brúkaranum uttan at taka ábyrgdina fyri lívinum frá honum.
- Hevur eina positiva menniskjafatan.
- Hevur hug og hegni til at arbeiða í einum tvørfakligum umhvørvi.
- Er opin, virkisfýsin og menningarsinnaður.
- Kann handfara og trívast við einum arbeiðsdegi, ið einki kann sigast um frammanundan.
- Er sterkur bæði til likams og sálar.
- Hevur eina viðkomandi útbúgving og royndir innan økið.

Umsøkjarar, ið hava útbúging sum pedagogar, heilsuhjálparar, ergo- og fysioterapeutar og starvsfólk við líknandi útbúgving hava fyrimun til starvið. Hvat viðvíkur øðrum útbúgvingum, sum primært ikki eru ætlaðar til arbeiði innan almanna- og heilsuøkið, verður víst til hjálparfólkasáttmálan hjá pedagogfelagum.

**Stuðulstænastan bjóðar**
- Eitt spennandi arbeiðspláss við møguleikum fyri persónligari og fakligari menning
- Ein virknan tvørfakligan starvsfólkahóp
- Samávirkan á gerandis uppgávur
- Kunning í arbeiðinum og supervision

**Setanartreytir**
Talan er um eitt avloysarastarv vegna barnsburð. Roknast má við, at arbeiðstíðirnar av og á eru skiftandi, dag-, kvøld- og vikuskiftisarbeiði. Løn sambært sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið. Setanarøkið umfatar Nærverkið og deildir undir tí.

Vilt tú vita meira um starvið, ert tú vælkomin at venda tær til Heidi Tvørfoss, samskipara á tlf. 554032.

**Umsókn**
Send eina umsókn við prógvi, upplýsing um útbúgving og møguligum viðmælum til:

Nærverkið
Stuðulstænastan
Postsmoga 3037
110 Tórshavn
Stílað.: Regin Johansen, deildarleiðari

**Umsóknarfreist: 19. september 2008.**

**Les meira á www.naerverk.fo/leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn · Tel 36 00 00 · Faks 36 00 01 · meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo

Starvslýsing

Stuðulstænastan

## Stuðulsfólk til unga gentu við menningartarni í Klaksvík

Stuðulstænastan søkir eftir tveimum tímaløntum stuðlum at arbeiða 12,5 tímar um vikuna hvør hjá ungari gentu í Klaksvík.

**Arbeiðsuppgávur**
At vera um kvinnuna og stuðla henni í skúlanum og heima við hús, tá hon ikki kann vera í skúla.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar, ið hava eina heilsufrøðiliga útbúgving hava fyrimun til starvið. Hvat viðvíkur øðrum útbúgvingum, sum primært ikki eru ætlaðar til arbeiði innan almanna- og heilsuøkið, verður víst til hjálparfólkasáttmálan hjá Føroya Pedagogfelag.

**Setanartreytir**
Løn sambært sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið. Setanarøkið umfatar Nærverkið og deildir undir tí.

Starvið verður at seta skjótast møguligt.

Vilt tú vita meira um starvið, ert tú vælkomin at venda tær til Heidi Tvørfoss, samskipara á tlf. 554032 ella Anniku Hansen, samskipara á tlf. 554037

**Umsókn**
Send eina umsókn við prógvi, upplýsing um útbúgving og møguligum viðmælum til:

Nærverkið
Stuðulstænastan
Postsmoga 3037
110 Tórshavn
Stílað.: Regin Johansen, deildarleiðari

**Umsóknarfreist: 22 september 2008.**

**Les meira á www.naerverk.fo/leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn · Tel 36 00 00 · Faks 36 00 01 · meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo

Starvslýsing

Heimatænastan

## Sjúkrarøktarfrøðingur í Heimatænastuni

Søkt verður eftir sjúkrarøktarfrøðingi at arbeiða í skiftandi vaktum í starvsbrøki 0,6 at byrja 1. Oktober 2008.

Arbeiðið umfatar røkt og umsorgan til heimabúgvandi borgarar og til búfólkini í Eldrasambýlinum. Arbeitt verður í tøttum samstarvi við aðrar fakbólkar innan skipanina

**Førleiki**
- Prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- Fakligan áhuga innan primera økið
- Góð samstarvsevni og dugir væl at samskifta
- Ynskiligt er at umsøkjarin hevur teldukunnleika á brúkarastøði

**Vit bjóða**
- Fakliga og persónliga menning
- Gott tvørfakligt samstarv
- Eitt sjálvstøðugt og fjølbroytt arbeiði
- Eitt jaligt og vinarligt arbeiðsumhvørvi

**Setanarviðurskifti**
Lønar- og setanarviðurskifti eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Felagið Føroyskir sjúkrarøktarfrøðingar. Setanarøkið er Nærverkið og tænastustaðurin er í løtuni Heimatænastan við útgangsstøði frá Vestmanna.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til økisleiðaran tlf. á 333249/282249. Umsókn saman við prógvi verður at senda til :

Heimatænastan Vágar/Norðstreymoy
Stílað: Sonja Klein, økisleiðari
Hornaveg 12
370 Miðvágur

**Umsóknarfreist: 19. september 2008.**

**Les meira á www.naerverk.fo/leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn · Tel 36 00 00 · Faks 36 00 01 · meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo



## Málningur til sølu

Oljumálningur eftir William Smith til sølu.
Stødd: uml. 95 x 70 cm.
Boð undir kr. 10.000,- hava ongan áhuga.

**Tlf. 211996 ella kho@post.olivant.fo**